Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 28.05.2025 kl. 17:30
Málnr.: 24/01278 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Annika S. Biskopstø, Signhild V. Johannesen, Hermann R. Samuelsen, Anfinn í Toft, Sylvia Thomsen, Jógvan Skorheim, Oddmar á Lakjuni, Eyðstein Ó. Poulsen, Fríðin Ziskason og Atli S. Justinussen
Varalimir: Mildrid á Lógv møtti fyri Anniku S. Biskopstø
Ikki møtt:
Onnur: John Færø, virkandi kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
36/25	25/00008-14	Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Annika S. Biskopstø
37/25	25/00626-1	Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2024 - Klaksvíkar Býráð
38/25	24/00926-35	Endurskoðan av fíggjarætlanini 2025 – *seinna viðgerð*
39/25	23/00583-27	Avloysa vetrarbit matr.nr. 137a, Svínoy
40/25	23/01301-22	Matr.nr. 125 í Svínoy - sundurbýti
41/25	23/01114-45	Matrikulering framvið matr.nr. 20i í Mikladali
42/25	25/00517-3	Umsókn um umbýti millum matr.nr. 261b og matr.nr. 241a
43/25	25/00629-3	Samanlegging - matr.nr. 407, 408 og 409 í Klaksvík
44/25	25/00320-3	Umsókn um keyp av innistøðu á Syðradali
45/25	21/01969-13	Grundstykkjalistin
46/25	25/00557-3	Leiga av norðurendanum av Kí-høllini til Snjallubjallu
47/25	25/00701-2	Gólvið í KÍ-høllini – *fyrra viðgerð*
48/25	22/00548-23	Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy - steðgað upp – *seinna viðgerð*
49/25	25/00476-7	Nýggj kvørn til Endurnýtsluna – *seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
50/25	25/00645-3	Keyp av lendi

Til viðgerðar

36/25
25/00008-14 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Annika S. Biskopstø

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	36/25

25/00008-14 Býráðslimi berst frá at møta á býráðsfundi, Annika S. Biskopstø

Frágreiðing um málið:
Annika S. Biskopstø býráðslimur, hevur boðað frá, at hon ikki fær røkt býráðsarbeiðið til og við 17. juni. Næstvalda á valevnislistanum er Mildrid á Lógv.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, §18, stk. 2 og 3.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til innkalling av tiltakslimi fyri Anniku S. Biskopstø.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Einmælt samtykt at lata Mildrid á Lógv taka sæti á fundinum.

37/25
25/00626-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2024 - Klaksvíkar Býráð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2025	44/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	37/25

25/00626-1 Roknskapur og grannskoðanarprotokoll 2024 - Klaksvíkar Býráð

Frágreiðing um málið:
Her er uppskot til roknskap og protokoll, sum grannskoðarin hevur sent okkum.

Roknskapurin er í tráð við mánaðarligu kunningina av nýtslu í mun til játtan. Víst verður í hesum sambandið til mál 25/0055 um kunning um likviditetstøðuna og roknskapin 2025. Har er gjøgnumgongd av roknskapinum 2024 við nærri útgreiningum av játtan, nýtslu, fíggjarstøðu, lyklatølum v.m. Har eru éisni útreiningar av játtan og nýstlu á einstøku rakstrarstøðunum.

Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verða roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna.

Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.

Sambært § 46 í kommunustýrislógini, skal býráðið eisini taka støðu til val av grannskoðara.

Í samband við fíggjarliga partin verður víst til s. 11 í ársroknskapinum (fíggjarstøða).

Víst verður eisini til hesar talvur í protokollini: 4.1.6 eykajáttanir, 4.1.7 roknskapartøl 2020-2025, 4.1.8 nýtslan í mun til játtan, 4.1.10 lyklatøl, 4.2.7 langfreistað skuld.

Stutt um roknskapin
Roknskapurin vísir 39 mió. kr. í halli áðrenn avdráttir.

Inntøkurnar eru 367,9 mió. kr., rakstur 305,6 mió. kr., íløgur 82,6 mió. kr., rentustuðul 7 mió. kr. og fíggjarpostar 11,5 mió. kr.

Áogn skuldarum og skattaeftirstøðum v.m. er 8,1 mió. kr, áogn hjá Gjaldstovuni 35,3 mió. kr. og innistandandi 17,5 mió. kr.

Bankaskuldin er hækkað netto 32,6 mió. kr. Lán eru upptikin fyri 49,6 mió. kr. og lán niðurgoldin við 17 mió. kr.

Lántøkan á 19,7 mió. kr. hevur samband við skuldarbrævið í Føroya Banka frá januar 2023. Tá tók kommunan eitt lán upp á 40 mió. kr., sum skuldi hevast, so hvørt tørvur var á pengum. 20 mió. kr. vóru hevaðar í 2023 og restin í apríl í 2024.

Í juni 2024 samtykti býráðið at taka lán í Føroya Banka upp á 30 mió. kr. sum skuldi brúkast sum gjaldførið - rinda rakstur og avdráttir.
Lánið varð hevað í ratum og seinasta gjaldið kom 20. des 2024.

			Broytingar 2024 - jan- des			Renta	
Lán (1.000)	31-12-2023	31-12-2024	Broyting	Lántøka	Avdráttir	Føst	Skiftand i 20-03-2025
BKN 6383515	-19.695	-39.464	19.770	19.770			3,9
BKN 6329022	-25.000	-25.000	0	0		3,14	
BKN 6316915	-25.005	-25.010	5	5			3,9
BKN 5695661	-17.550	-16.250	-1.300		-1.300	2,57	
BKN 6556959		-29.898	29.898	29.898			4,05
F. Lívstrygging P/F 77-11(	-2.717	-1.148	-1.569		-1.569		4,64
BETRI 5079235	-29.859	-27.937	-1.922		-1.922	2,5	
BETRI 5494453	-6.611	-6.166	-445		-445		3,7
BETRI 5548413	-22.121	-20.981	-1.140		-1.140	1,3	
BETRI 5604542	-39.071	-36.275	-2.796		-2.796	1,43	
NSP - Lán skuld ísbv NBH	-14.562	-14.172	-390		-390		3,55
NSP 3109733 - Lán	-25.207	-23.577	-1.629		-1.629	2,15	
NSP 3175604 - Biskupstc	-12.571	-12.222	-349		-349		3,55
NSP 3227981 - Lán	-33.040	-32.458	-582		-582		3,55
NSP 3239149 - Lán	-21.605	-19.718	-1.887		-1.887		3,39
NSP 3287283 - Lán	-60.240	-57.181	-3.059		-3.059		3,55
Umflokking innistandandi í kredit			0		0		
NSP 3314132 lán ísbv Atl	-3.716	-3.722	6		6		3,55
Lán ultimo	-358.568	-391.180	32.612	49.673	-17.062		

Lániskuldin er 391,1 mió. kr., kreditorar 34,7 mió. kr. og onnur skuld 15,8 mió. kr.
Avseting til Landsverk ísbv grót til Norðhavnina (6,3 mió kr) er íroknað teimum 15,8 mió. kr.

Nettoskuldin er 381 mió. kr., sum er 12 mió. kr. omanfyri skuldarmarkið.

Býráðslimirnir skulu undirskriva roknskapin og protokollina.

Fylgisskjøl:

- Roknskapur 2024 – uppskot
- Grannskoðanarprotokoll 2024

<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>

<u>Lógargrundarlag:</u>
§ 46. Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal veljast.
Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum.

§ 53, stk. 2, 1) roknskapurin skal verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

Fíggjarligar avleiðingar:
Roknskapurin 39 mió. kr. í halli áðrenn avdráttir.

Bankaskuldin er 391,1 mió. kr.

Innistandandi 17,5 mió. kr. er ov lítið at dekka leysaskuldina (ognarar v.m.) og tí er mál fyri nú um at taka lán upp á 40 mió. kr. til rakstur og avdráttir.

Nettoskuldin er 12 mió. kr. yvir eina álíkning

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin góðtekur uppskotini um roknskap og protokoll og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna.

Val av grannskoðara.

Roknskapur og protokoll skulu undirskrivast á býráðsfundinum.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 22-05-2025, og nevndin mælir til at framyvir verður grannskoðari við til fundirnar, táið ársroknskapurin verður viðgjørdur av fíggjarnevndini.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Grannskoðaði ársroknskapurin fyri 2024 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll einmælt góðkendur. Harumframt einmælt samtykt at lata SPEKT halda fram sum grannskoðari kommununnar.

38/25
24/00926-35 Endurskoðan av fíggjarætlanini 2025 – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2025	45/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.04.2025	31/25
4 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	40/25
5 Mentanarnevndin	20.05.2025	31/25
6 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	20.05.2025	27/25
7 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	20.05.2025	15/25
8 Havna- og Vinnunevndin	21.05.2025	25/25
9 Tekniska Nevnd	21.05.2025	29/25
10 Fíggjarnevndin	22.04.2025	28/25
11 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	38/25

24/00926-35 Endurskoðan av fíggjarætlanini 2025

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. apríl 2025.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:

Sí viðfestu skjøl.

Tilmæli:
Málið um endurskoðan av fíggjarætlanin verður hervið lagt fyri nevndir og býráð til viðgerð og støðutakan.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2025:
Ein meiriluti, AíT, SVJ og HRS, tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-04-2025.
Ein minniluti, JS og OáL, tekur ikki undir við málinum.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2025:
Ein meiriluti, KHJ, HRS, ASB, AíT, SVJ og ST, tekur undir við, at fíggjarætlanin verður endurskoðað samsvarandi undirskjalinum "*Fíggjarætlan 2025 – endurskoðan – dagføring apríl – arbeiðsskjal – (Karl) – 11-04-2025*", tó við hesum broytingum:
- Námsfrøðiliga Ráðgevingin –600 tús.kr.
- Barnaverndin -1,65 mió.kr.
- Barnaansing felags -150 tús.kr. (íroknað víðkan av Fjallafípuni í KÍ-høllini)
- Byggibúning á Fossum +1 mió.kr.
- Vegir íløgur +1 mió.kr.

Soleiðis at samlaða avlopið av endurskoðanini verður 1,586654 mió.kr.

Ein minniluti, JS, OáL, EÓP, FZ og SáH, atkvøddi ímóti.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Ein meiriluti, AíT, HRS og SVJ, tekur undir við meirilutaviðtøkuni hjá býráðnum, 28-04-2025.
Ein minniluti, JS, heldur fast við minnilutaviðtøkuna hjá býráðnum, 28-04-2025.

Mentanarnevndin 20. mai 2025:
Ein meiriluti, SVJ, HRS og ASB, tekur undir við meirilutanum hjá UBN, 19-05-2025.
Ein minniluti, ASJ og FZ, taka støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 20. mai 2025:
Ein meiriluti, ASB, HRS, AíT, tekur undir við meirilutanum hjá MeN, 20-05-2025.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 20. mai 2025:
Ein meiriluti, ASB, SVJ, AíT, tekur undir við meirilutanum hjá TrN B&U, 20-05-2025.
Ein minniluti, ASJ og FZ, tekur støðu í býráðnum.

Havna- og Vinnunevndin 21. mai 2025:
Ein meiriluti, AíT, HRS og SVJ taka undir við meirilutanum í TrN E&B, dagf. 20-05-2025.
Ein minniluti, FZ og OáL taka støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 21. mai 2025:
Ein meiriluti, HRS, AíT og ASB, tekur undir við meirilutanum í E&B 20-05-2025.
Ein minniluti, ASJ og OáL, tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Ein meiriluti, KHJ, AíT og SVJ, tekur undir við meirilutanum í TN 21-05-2025.
Ein minniluti, JS og OáL, taka støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá BýR 28. apríl 2025; tað varð samtykt við 6 avtkvøðum fyri (KHJ, MáL, SVJ, HRS, AíT og ST) og 5 atkvøðum ímóti (JS, OáL, EÓP, FZ og ASJ).

39/25
23/00583-27 Avloysa vetrarbit matr.nr. 137a, Svínoy

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	09.05.2025	13/25
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	58/25
3 Fíggjarnevndin	26.05.2025	58/25
4 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	39/25

23/00583-27 Avloysa vetrarbit matr.nr. 137a, Svínoy

Frágreiðing um málið:
Í samband við ætlanina um at gróðurseta rundan um svimjihylin í Svínoy varð áheitan send hagastýrinum fyri Hagan Handantúnstriðingur fyri norðan ánna í Svínoy um at vetrarfriða ein part av matr.nr. 137a. Hagafundur var 3. mai 2024, og avgjørt var, at kommunan keypir bit av matr.nr. 137a.

Skitsa, inngirt økið

Í dag er økið inngirt, men ikki heilt í tráð við innsendu skitsu frá hagastýrinum. Fyrisitingin mælir tó til, at hegnið verður tillagað sbrt. hagarakstur í samráð við hagastýrið.

Burðardygd og heimsmálini:
Mál.11: Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar
Mál.15: Verja, endurbøta og virka fyri burðardyggari nýtslu av jarðvistskipanum, á burðardyggan hátt røkja skóg, berjast ímóti oyðimarkarmyndan, steðga og venda landtýningum og lívmargfeldismissi.

Lógargrundarlag:
- Kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 96 frá 3. juli 2013 *(Prísir)*

Fíggjarligar avleiðingar:
Prísstøði verður somu prísir sum Bst. nýtir.
0,70 kr fyri fermeturin fyri hagalendi/ódyrkað lend

Matr.nr. 137a (við svimjihylin, eystari) er 3.453 m^2 til støddar.

Endurgjaldi er kr. 2.417,10,-

Konta, Byggibúning bústaðir

Tilmæli:
Mælt verður til, at vetrarfriða allan lutin matr.nr. 137a (við svimjihylin, eystari) á 3.453 m^2.

Svínoyarnevndin 9. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 28-04-2025.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 09-05-2025.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 19-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

40/25
23/01301-22 Matr.nr. 125 í Svínoy - sundurbýti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	09.05.2025	14/25
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	60/25
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	40/25

23/01301-22 Matr.nr. 125 í Svínoy - sundurbýti

Frágreiðing um málið:
28. nov. 2024 samtykti Klaksvíkar Býráð at viðmæla umsókn um sundurbýti av matr.nr. 125 í Svínoy, við teirri viðmerking, at nýtsla av teimum einstøku frábýttu lutunum verður at samsvara við ta til eina og hvørja tíð galdandi byggisamtykt.

10. mars 2025 svarar Umhvørvisstovuna umsøkjaranum, at umsóknin ikki kann gangast á møti, tí Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu ikki ásetur minstuvídd fyri landbúnaðarjørð.

Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin – í umbúna í heildarendurskoðan

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Vísandi til býráðssamtykt frá 28. nov. 2024 og samtykta uppskot til endurskoðan av Almennu Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar Kommunu, verður mælt til at viðmæla undantaksloyvi til umsøkta sundurbýti av matr.nr. 125 í Svínoy.

Svínoyarnevndin 9. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 28-04-2025.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við Svínoyarnevndini 09-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá UBN 19. mai 2025 einmælt samtykt.

41/25
23/01114-45 Matrikulering framvið matr.nr. 20i í Mikladali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	53/25
2 Tekniska Nevnd	21.05.2025	40/25
3 Fíggjarnevndin	26.05.2025	59/25
4 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	41/25

23/01114-45 Matrikulering framvið matr.nr. 20i í Mikladali

Frágreiðing um málið:
Vísandi til viðgerðir higartil í málinum er - sum kunnugt - gjørd semja við eigaran av matr.nr. 23b um kommunala yvirtøku av vegnum, - matr.nr. 23b - í Mikladali. Somuleiðis hava eigararnir sunnanfyri matr.nr. 23b váttað, at teir vilja lata lendi til víðari vegagerð suðureftir, um hetta verður aktuelt.

Við hesum metir Tekniska Fyrisiting vera klárt at fara undir sundurbýti av matr.nr. 20i til grundøkir útfrá niðanfyri vístu ætlan. (skjal I)



Útstykking sambært skjal I (viðgjørt á fundum í okt/nov. 2023)

Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11 – Burðadyggir býir og býlingar

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjast Byggibúning grundøkir

Tilmæli:
Málið verður við hesum latið avvarðandi nevndum og býráði – ávikavist til kunningar og samtyktar. (Mikladalsnevndin kunnað 6. mai 2025 via mál 25/00621).

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-05-2025.

Tekniska Nevnd 21. mai 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 19-05-2025.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við TN, dagf. 21-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

42/25
25/00517-3 Umsókn um umbýti millum matr.nr. 261b og matr.nr. 241a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	50/25
2 Tekniska Nevnd	21.05.2025	35/25
3 Fíggjarnevndin	26.05.2025	54/25
4 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	42/25

25/00517-3 Umsókn um umbýti millum matr.nr. 261b og matr.nr. 241+ litra at

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn dagf. 31. mars 2025 frá eigaranum av matr.nr. 261b, Búðaskákið 4, um umbýti av lendi framvið Klaksvíksskákinum.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarlig viðurskifti:
Lendini í umsøktu umskipan liggja innanfyri sama økispart: A5 (blandað íbúðar- og vinnuendamál)
Ognarviðurskifti:
Partvís kommunal – partvís privat.
Ideella støðan er, at kommunan eigur alt lendi undir kommunala veganetinum. Hetta er tó ikki galdandi allastaðni, tí í støðum røkka partar av privatum ognum út í vegin. Hinvegin roynir kommunan, so vítt gjørligt at "lofta" møguleikanum fyri keypi, tá hesin býðst.

Við umsøktu umskipanin fær matr.nr. 261b uml. 23 m^2 frá kommunala økinum, matr.nr. 241a, meðan kommunala vegøkið – litra at – fær uml. 11 m^2 frá matr.nr. 261b

Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11 – Burðardyggir býir og bylingar

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi og tað, at ongar ætlanin fyriliggja fyri kommunala tríkantinum millum matr.nr. 261b og Klaksvíksskákið, mælir Tekniska Fyrisiting til at ganga umsóknini á møti, treytað av, at umsøkjarin rindar kr, 110,-/m^2, fyri meirvíddina í hansara part.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-05-2025.

Tekniska Nevnd 21. mai 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 19-05-2025.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við TN, dagf. 21-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

43/25
25/00629-3 Samanlegging - matr.nr. 407, 408 og 409 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	51/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	43/25

25/00629-3 Samanlegging - matr.nr. 407, 408 og 409 í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til samanlegging av omanfyri nevndu matriklum framvið Klaksvíksvegi.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarligar ásetingar:
Allir matriklarnir liggja í økisparti A32 (Blandað íbúðar og vinnuendamál)
Minsta loyvda grundøkjavídd: 150 m^2.
Verandi víddir:
Matr.nr. 407: 77 m^2
Matr.nr. 408: 78 m^2
Matr.nr. 409: 32 m^2
Tilsamans: 187 m^2
Ognarviðurskifti: - (treytin fyri samanlegging er, at sami eigari er til allar matriklarnar)
Matr.nr. 407: P/f Føroya Bjór

Matr.nr. 408: P/f Føroya Bjór
Matr.nr. 409: Føroya Jarðargrunnur (sambært upplýsingum frá umsøkjaranum avgreiðir Búnaðarstovan skeytið beinleiðis til P/f Føroya Bjór í komandi viku)



Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11 – Burðadyggir býir og býlingar

Lógargrundarlag:
Matriklullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla samanlegging, tá ognarviðurskiftini loyva hesum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Jógvan Skorheim luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni. Tilmælið frá UBN 19. mai 2025 einmælt samtykt.

44/25
25/00320-3 Umsókn um keyp av innistøðu á Syðradali

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Syðradalsnevndin	06.05.2025	7/25
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	55/25
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	44/25

25/00320-3 Umsókn um keyp av innistøðu á Syðradali

Frágreiðing um málið:
Festari á Syðradali hevur søkt Búnaðarstovuna um keyp av tveimum hjallum við uttanumøki burturav innangarðs festijørð síni - matr.nr. 31a. Umsøkta lendi kann leggjast saman við ogn hjá umsøkjaranum – antin matr.nr. 52 ella 53c. Í e-posti 18-02-2025 biður Búnaðarstovuna um kommununnar ummæli til umsóknina.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til málið:

- Byggisamtyktarliga liggur umsókta lendi við ábygdum hjallum í økisparti B (sethúsaøki)
- Kommunan hevur søkt Búnaðarstovuna um keyp av uml. 120 m^2 til sparkivøll av sama matrikli. Umsøktu sølur av hjalslendunum eru ikki í stríð við hesa ætlan.

Burðardygd og heimsmálini:
Nr. 11 – Burðardyggir býir og býlingar

Lógargrundarlag:
Almenna Byggisamtyktin
Lógin um landsjørð
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting hevur onki í móti, at lendið verður selt til samanleggingar við matr.nr. 52, um hetta kann gerast uttan byggisamtyktarbroyting og verandi servituttir um ferðslurætt fylgja við.

Syðradalsnevndin 6. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmæli frá Fyrisitingini dagf. 22-04-2025. Bjørn H. S. S. Kalsø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við SyN 06-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá UBN 19. mai 2025 einmælt samtykt.

45/25
21/01969-13 Grundstykkjalistin

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	19.05.2025	43/25
2 Fíggjarnevndin	26.05.2025	50/25
3 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	45/25

21/01969-13 Grundstykkjalistin

Frágreiðing um málið:
Í mars 2025 samtyktu UBN og FíN, at arbeiðast skuldi víðari við eini nýggjari og smidligari loysn at bjóða grundstykkir út.

Verandi háttur fyrigongur í stuttum soleiðis: ein meldar seg á grundstykkjalista og fær bjóðað grundstykki við lutakasti, tá grundstykkir eru tøk.

Tilmelding til grundstykkjalistin hevur verið støðug tey seinastu 6 árini við uml. 100-150 fólkum teknaði. Men royndir hava víst, at tá fólk tekna seg á grundstykkjalistan, so eru tey sum oftast til reiðar at fara undir bygging beinanveg men enda aftast á grundstykkjalistanum. Tá eru útlitini til, at tey fáa bjóðað grundstykki í nærmastu framtíð sera lítil. Av tí sama gerast fólk vónsvikin og ørkymlað, tá tey frætta hetta.
Tá tey so einaferð (upp til fleiri ár seinni) fáa bjóðað grundstykki, so hava tey ofta funnið aðra loysn til bústað.

Tá útlutan er, so verður innbjóðing send, men javnan hendir tað seg, at fólk ikki boða frá ella møta ikki upp. Av tí sama verða ofta 1-3 pláss tóm til útlutanina. Útlutanir í sær sjálvum taka tíð, tí innbjóðingar skulu sendast í rímiligari tíð, fyrireikan av útlutanini á degnum og harnæst avgreiða søluna.

Umsitingin hevur kannað ymiskar aðrar hættir at fremja sølu av kommunalum grundstykkjum. Millum annað hevur verið kannað, hvat aðrar kommunur gera, t.d. Tórshavnar kommuna, Nes kommuna og Eysturkommuna.
Hátturin í Tórshavnar kommunu minnir nakað um verandi hátt við tilmelding og lutakasti, tá ið útstykkingar eru, meðan Nes kommuna og Eysturkommuna hava almennan sølulista, har "først til mølle" prinsippið er galdandi; borgarin meldar til ígjøgnum heimasíðuna við at velja ynskta grundstykkið og hevur síðani 3 vikur at fullfíggja keypið sambært ásettu reglum.

Umsitingin sær positivt uppá loysnina, ið Nes kommuna og Eysturkommuna nýta og sær møguleikar í at fara yvir í eina líknandi loysn fyri Klaksvíkar kommunu.

- Borgari, ið er klárur at fara undir bygging, hevur møguleika at fáa hendur á byggilendi, tá ið tað er tøkt
- Eingin grundstykkjalisti at umsita, innkrevjan av depositum, minni fyrireikan t.d. innbjóðing og útlutan
- Verandi sølulisti yvir tøk kommunal grundstykkir verður partur av nýggju skipanini
- Søla av grundstykkjum verður samlað eitt stað
- Gjøgnumskygni
- Framtíðarynski/møguleiki at knýta Samleikan uppí.

Umsitingin mælir til at varðveita summar av treytunum í verandi reglugerð t.d.:

- ikki eiga kommunalt ella privat grundøki í Klaksvíkar kommunu ella vera samlivandi við persón, ið eigur slíkt grundøki
- um umsøkjari ella hjúnafelagi/samlivari eigur fastogn í Klaksvíkar kommunu (har ein kann hava privatan bústað), tá hann fær tilboð um kommunalt grundøki, kann hann ikki fáa játtað grundøki frá kommununi, fyrrenn váttan fyriliggur uppá, at fastognin verður seld

Nýggj mannagongd ísb. við talgilda sølu
Listin yvir tøk grundstykkir verður dagførdur fyrsta arbeiðsdag í hvørjum mánaði kl. 12.00. Harvið fáa øll kunning um tøk grundstykkir samstundis.
Síðani kann ein velja sær grundstykki og senda umsókn um at keypa tað. Umsókn skal sendast umvegis frymil/oyðublað inni á søluloysnini á heimasíðuni.
Tá fyrsti umsøkjari hevur sent umsókn um at keypa eitt ávíst grundstykki, verður hetta frámerkt sum "Umbiðið". Síðan ber ikki til hjá øðrum at søkja um tað grundstykkið.
Grundstykkið skal gjaldast í seinasta lagi 3 vikur eftir, at umsóknin er send kommununi.
Verður ikki goldið rættstundis, verður grundstykkið lýst leyst aftur næstu ferð, tá listin verður dagførdur.

Vinaliga lesið skjal *Reglugerð fyri talgildari sølu av lendi.*
Uppskot til skriv til borgarar á grundstykkjalistanum er hjálagt.

Burðardygd og heimsmálini:
Heimsmál nr. 11

Lógargrundarlag:
§ 2, stk. 4 í kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, *kommunala útstykkingar o.l., har tillutan og prísáseting fara fram eftir frammanundan ásettum reglum.*

Fíggjarligar avleiðingar:
Talgild søla:
Útreiðslur eru ísb. við at menna søluloysnina á heimasíðuni. Mettur kostnaður kr. 30.000-50.000,- *(konta: Byggibúning bústaðir).*

Endurrindan av depositum:
102 fólk standa á grundstykkjalistanum, hesi hava goldið dep. á kr. 2500,-. ~ kr. 255.000,- *(konta: Onnur kravd gjøld, bøtur o.a.).*

Tilmæli:
Avgerð um avtøku av grundstykkjalistanum fyri Klaksvíkar kommunu verður løgd fyri nevnd og býráð til støðutakan. Í staðin verður kommunal grundstykkjasøla framd sbrt. *Reglugerð fyri talgildari sølu av grundstykkjum* og talgildari søluskipan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 19. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 08-05-2025. Nevndin vil hava uppskot til skeyti við sum undirskjal til býráðsfundin 28. mai 2025.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 19-05-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

46/25
25/00557-3 Leiga av norðurendanum av Kí-høllini til Snjallubjallu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	20.05.2025	30/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	46/25

25/00557-3 Leiga av norðurendanum av Kí-høllini til Snjallubjallu

Frágreiðing um málið:
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 6. mai 2025. Í stuttum snýr málið seg um, at frítíðarskúlin Snjallabjalla hevur tørv á størri hølum, tí í summar kemur ein stórur árgangur av børnum inn á stovnin. Umsitingin hevur saman við leiðsluni í Snjallubjallu kannað møguleikar og er komin til, at norðurendin á KÍ-høllini, sum er kommunal, er ein hóskandi loysn.

Burðardygd og heimsmálini:
3. heimsmál: Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

Lógargrundarlag:
Dagstovnalógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Í samband við hesa møguligu loysn, so hevur umsitingin gjørt eina metta kostnaðarmeting av 1. hálva árinum.

Lønar- og rakstrarútreiðslur :	kr.	550.000 í 6 mðr.
Keyp av innbúgvi:	kr.	150.000 (Hetta er okkara boð út frá tilboðið til Fjallafípuna frá feb. 2023)
Húsaleiga:	kr.	60.000 í 6 mðr
Ymiskt ísbv stovnan:	kr.	100.000 (tekøkur og arbeiði í samband við tekøkin og annað)
Íalt:	**kr. 671.000 til stovnan og rakstur í 2025**	

Hædd má sjálvandi takast fyri at tað eru fleiri ókendir faktorar enn, men hetta meta vit vera ein skikkað kostnaðarmeting.

Leigumálið í ovaru hæddina í Heygabúðini er sagt upp tann 30.04.25. Uppsagnartíðin er 6 mðr. Húsaleigan til Heygabúðina er kr. 10.200 um mðr., og hon verður goldin av Barnaansingfelags. Her verður nakað av peningi spardur framyvir.

Tilmæli:
Umsitingin mælir trivnaðarnevndini Børn & Ung til at partur av virkseminum hjá frítíðarskúlanum Snjallubjallu verður í parti av norðurendanum av KÍ høllini tíðarskeiðið frá summarinum 2025 og tvey ár fram til summarið 2027 og at játta kr. 671.000 til stovnan og rakstur fyri 2025.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 20. mai 2025:
Ein meiriluti, ASB, AíT og HRS, tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-05-2025.
Ein minniluti, ASJ, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Málið útsett til komandi nevndarumfar, málið skal tá í allar viðkomandi nevndir.

47/25
25/00701-2 Gólvið í KÍ-høllini – *fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	26.05.2025	47/25
2 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	47/25
3 Klaksvíkar Býráð	26.06.2025	

25/00701-2 Gólvið í KÍ-høllini

Frágreiðing um málið:
Gólvið í KÍ-høllini verður í hesum døgum skift, og upprunaliga var ætlanin, at bara sitiplássini niðan ímóti Bøgøtu skuldu skiftast út við eina mobila loysn. Hendan loysnin ger, at umleið 100 fermetrar fleiri verða tøkir til upphiting/venjing hjá feløgunum. Eftir at avgerðin bleiv tikin um at skifta gólvið hava feløgini Team Klaksvík, Stjørnan og Hávur havt eitt ynski um, at allur hondbóltur bleiv savnaður inni í KÍ-høllini, saman við kurvabólti, og tí ynskti man at fáa at harðari gólv, sum var nakað dýrari.

Við byrjanina av arbeiðinum við at taka gólvið av kom hugskot fram um at gera báðar síðurnar við sitiplássum mobilar og tí fáa nærum 200 fermetrar meiri til upphiting/venjing, umframt at hesir fermetrar koma væl við, tá onnur tiltøk enn ítróttartiltøk eru í høllini.

Hendan broyting kostar umleið 300.000,- meiri til fleiri fermetrar gólv umframt sitiplássini.
Við at flyta 200.000,- frá rakstrarstaðnum *Stuðul til mentan, tónleikur o.a.* til íløgujáttanina *ítróttarøkið íløga, KÍ høllin*, umframt at 100.000,- verða fluttar frá *sparkivallir/spælipláss* til *ítróttarøkið íløga, KÍ høllin*.

Hetta bleiv reist sum eykamál á fundi í mentanarnevndini 20.05.2025, og tók nevndin undir við tilmælinum.

Burðardygd og heimsmálini:

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kr. 200.000,- verða fluttar frá *Stuðul til mentan* til *Ítróttarøkið íløga*, og kr. 100.000,- verða fluttar frá *Sparkivallir/spælipláss íløga* til *Ítróttarøkið íløga*.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur undir við mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin 26. mai 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 21-05-2025, og at ein kunning um samlaða kostnaðin, verður við í málinum til seinnu viðgerð.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá FíN 26. mai 2025 einmælt samtykt.

48/25
22/00548-23 Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy - steðgað upp – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.04.2025	36/25
2 Havna- og Vinnunevndin	09.04.2025	21/25
3 Tekniska Nevnd	09.04.2025	21/25
4 Fíggjarnevndin	22.04.2025	38/25
5 Klaksvíkar Býráð	28.04.2025	33/25
6 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	48/25

22/00548-23 Vesi/bíðirúm á Eiðinum í Svínoy - steðgað upp

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. apríl 2025.

Burðardygd og heimsmálini:
Vísast kann á mál nr. 9 og 11, sum umfatar undirstøðukervi og burðardyggir býir og býlingar, sum Føroya Landsstýri og Klaksvíkar kommuna hava tikið undir við.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin peningur er játtaður serstakt til málið.
Um tikið verður undir við málinum, verður neyðugt at broyta fíggjarætlanina fyri 2025 íløgupartin, har 100 tkr. í part verða tiknar av t.d. Byggibúning Bústaðir (Í), Havnin Íløgur og Vegir Íløgur. Peningurin verður síðani at flyta til Fastognir Íløgur, avsett til bíðirúmið í Svínoy.
Talan er um broyting av fíggjarætlanini, og tí skal málið hava tvær viðgerðir.

Tilmæli:
Mett er, at málið hevur bíðað ov leingi. Tí mælir Tekniska Fyrisiting til eina serstaka viðgerð av hesum málinum, soleiðis at bíðirúmið og vesið á Eiðinum í Svínoy verður gjørt liðugt.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 7. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-03-2025.

Havna- og Vinnunevndin 9. apríl 2025:
Nevndin tekur undir UBN, dagf. 07-04-2025.

Tekniska Nevnd 9. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við HaVN 09-04-2025.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við TN 09-04-2025.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2025:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 22. apríl 2025 einmælt samtykt.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Tilmælið frá BýR 28. apríl 2025 einmælt samtykt við seinni viðgerð.

49/25
25/00476-7 Nýggj kvørn til Endurnýtsluna – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	07.04.2025	38/25
2 Tekniska Nevnd	09.04.2025	20/25
3 Fíggjarnevndin	22.04.2025	37/25
4 Klaksvíkar Býráð	28.04.2025	34/25
5 Klaksvíkar Býráð	28.05.2025	49/25

25/00476-7 Nýggj kvørn til Endurnýtsluna

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 28. apríl 2025.

Burðardygd og heimsmálini:
Vísandi til Heimsmálini, sum Føroya Landsstýrið og Klaksvíkar kommunan taka undir við, verður víst til mál nr. 9 undirstøðukervi, mál nr. 11 burðardyggir býir og býlingar, og mál nr. 15 lív á landi.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin peningur er settur av til keyp av nýggjari kvørn.
Uppskot til fígging frá fyrisiting og leiðarum, um viðkomandi nevndir viðmæla málinum:

Av rakstrarkonto til Umhvørvistiltøk *(AA/SNT)*	kr. 50.000,-
Av Byggibúning Bústaðir (AA/HMH/SNT)	- 50.000,-
Av Kloakkir Íløgur *(HMH/KO)*	- 100.000,-
Av Vegir Íløgur *(AA/HMH)*	- 100.000,-
Í alt	kr. 300.000,-

Um tikið verður undir við uppskotinum til fígging, krevur málið hesa fíggjarætlanarbroyting:
50 tkr. av rakstri Umhvørvistiltøk til Maskinur Íløgur.
50 tkr. av Íløgukontuni Byggibúning Bústaðir til Maskinur Íløgur
100 tkr. av Kloakkir Íløgur til Maskinur íløgur.
100 tkr. av Vegir Íløgur til Maskinur Íløgur.

Samlaða avsetingin til kontuna Maskinur Íløgur verður sambært hesum 1,6 mió. kr., og verður tá rúm fyri keypi av nýggjari kvørn fyri 300 tkr.

Sambært hesum hækkar íløgusíðan á fíggjarætlanini fyri 2025 við 50 tkr., og rakstrarsíðan minkar tilsvarandi við 50 tkr. Málið krevur sum kunnugt tvær býráðsviðgerðir.

Tilmæli:
Fyrisitingin viðmælir, at ein nýggj kvørn verður keypt í staðin fyri ta gomlu. Viðv. fíggjarspurninginum verður vístil omanfyri standandi uppskot, ella at býráðið raðfestir málið í 2026.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 7. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 25-03-2025.
Jensa Anthoniussen, nevndarskrivari, fór av fundinum, meðan málið var til viðgerðar.

Tekniska Nevnd 9. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við UBN 07-04-2025, og at keypið verður raðfest í ár.
Jensa Anthoniussen, nevndarskrivari, fór av fundinum, meðan málið var til viðgerðar.

Fíggjarnevndin 22. apríl 2025:
Nevndin tekur undir við TN 09-04-2025.
Jensa Anthoniussen, nevndarskrivari, fór av fundinum, meðan málið var til viðgerðar.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2025:
Tilmælið frá Fíggjarnevndini 22. apríl 2025 einmælt samtykt.
Jensa Anthoniussen, protokollførari, fór av fundinum, meðan málið var til viðgerðar.

Klaksvíkar Býráð 28. mai 2025:
Jensa Anthoniussen, protokollførari, fór av fundinum, meðan málið var til viðgerðar. Tilmælið frá BýR 28. apríl 2025 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

50/25
25/00645-3 Keyp av lendi

Fundurin lokin kl. 21:15